# Bygdarráðsfundur - eyka

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 08.05.2024 kl. 19.00

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Martin í Nesi
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen
Heri Norðberg (fyri Ronni Hammer)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

**1.**
**102-14-2024: Kommunusamanlegging – tilmæli um "Vegleiðandi fólkaatkvøðu".**
Á bygdarráðsfundi tann 09.04.2024 mælti Janus Thomsen, borgarstjóri bygdarráðnum til at taka álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging í norðaru helvt av Suðuroy til eftirtektar og at heita á arbeiðsbólkin um at fyrireika uppskot til fólkaatkvøðu í Hvalbiar Kommunu. Hetta varð samtykt við fýra atkvøðum fyri.

**Málsgongd síðani:**
Arbeiðsbólkurin hevur havt nakrar eftirmetingarfundir við kommunustyrið í Hvalba og á Tvøroyri í apríl og mai mánaða og hevur nú orðað eitt semjuskjal, ið er handað hvørjari kommunu sær hin 4. mai til støðutakan.

Janus Thomsen, borgarstjóri kunnar um í fylgiskrivi til semjuskjalið, at á felagsfundi í Hvalba á flaggdegnum, har flestu kommunustýrislimir vóru møttir, varð samtykt at seta ein fylgibólk við kommunustýrislimum, sum saman við arbeiðsbólkinum skuldi orða eitt semjuskjal, við m.a. støði í lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. Á fundinum í Hvalba á flaggdegnum varð samtykt, at borgarstjórarnir skuldu vera í fylgibólkinum umframt 2-3 kommunustýrislimir í hvørjari kommunu sær. Hvalbiar Kommuna var umboðað av borgarstjóranum og Poul Laust Christiansen, ið hava havt innanhýsis fundir við arbeiðbólkin.

Borgarstjórin upplýsir, at arbeiðsbólkurin og umboðini fyri Tvøroyrar- og Hvalbiar Kommunu í fylgibólkinum taka undir við semjuskjalinum og mæla umboðini fyri Hvalbiar Kommunu bygdarráðnum til at taka undir við fyriliggjandi semjuskjali.

Borgarstjórin mælir til, at bygdarráðið samtykkir semjuskjalið sum fyriliggjandi og at miðað verður eftir at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í Hvalba og á Tvøroyri samstundis um hálvan juni 2024.

**<u>Avgerð:</u>**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri. Poul Laust Christiansen tók ikki undir við hesum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg Martin í Nesi

Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen Heri Norðberg